VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strrúk. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Seint um kvøldið møguliga regn. Hitin millum 16 og 19 stig.



Veðrið leygardagin:
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av útsynningi og eitt skifti regn, men seinnapartin minni vindur og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

Veðrið sunnudagin og mánadagin:
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av útsynningi, mánadagin hækkar hann upp í útnyrðing. Stundum regn ella ælingur og hitin millum 8 og 12 stig.

DAGSINS FERÐAFÓLK

"Vit hava verið heppin við veðrinum"

Ella Balvers og Diny van de Ven eru úr Kaatsheuvel í Hollandi. Tær báðar skulu vera her í tvær vikur, og fara avstað aftur komandi leygardag

Rólant Waag Dam
rolant@sosialurin.fo

Hvussu ber tað til, at tit eru í Føroyum?
- Onnur okkara hevur verið í Íslandi, og hin hevur verið í Írlandi. Vit dámdu báðar væl á teimum støðunum, og síðani hoydu vit, at Føroyar líkjast teimum og tá gjørdu vit av at fara.

Og líkjast Føroyar so Írlandi og Íslandi?
- Tað er eitt sindur torført at svara uppá. Tað ber ikki til at siga, at Ísland er eitt, Írland eitt annað og so eru Føroyar mitt ímillum. Føroyar eru serstakar og líkjast burtur úr, men sjálvandi eru felagseyðkenni.

Hvat fáa tit tíðina her at ganga við?
- Tað er ongin trupulleiki. Vit búgva ikki á hotel, men í einum lítlum húsum, og skulu matgera sjálvar. So hvønn dag mugu vit keypa okkurt, vit kunnu gera til døgurða. Annars hava vit gingið runt í býnum, og so verið onkrar túrar.

Mánadagin vóru vit á Kunningarstovuni, og har bíløgdu vit okkum nakrar túrar runt í oyggjunum.

Hvar hava tit so verið?
- Í gjár vóru vit allan dagin í Norðoyggjum, og tað var ein óførur túrur. Nú í morgun skulu vit ein busstúr til Vestmanna, sum vit eisini gleða okkum til, so vit keða okkum ikki.

Hvussu komu tit til Føroya?
- Vit flugu her til umvegis Keypmannahavn, og tað gekk bara væl. Vit hava frætt, at vit hava verið heppin, tí at veðrið hevur verið so ringt her og flogførini ikki hava lent, men hjá okkum var ongin trupulleiki. Og meðan vit hava verið her skilja vit eisini, at vit hava verið heppin við veðrinum, tí burtursæð frá leygardegnum, tá vit komu, so hevur veðrið verið frálíkt.

Hvussu er býurin Kaatsheuvel?
- Eg vildi ikki kalla tað ein bý, men heldur eina bygd. Men bygdin er kend fyri sínar sagnir, ævintýr og skógir og fólk koma allastaðni frá og vitja.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	--
Nuuk	9
Qaqortoq	8
Ammassalik	4
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	11
Seyðisfjørður	7
Tórshavn	11
Lerwick	13
Aberdeen	16
London	20
Tromsø	--
Bergen	15
Oslo	--
Stokkhólm	22
Keypmannah.	--
Helsinki	24
Moskva	27
Berlin	28
Warzawa	32
Kiev	27
Bukarest	27
Paris	27
Madrid	37
Róm	29
Malorca	30
Athen	27
Malta	28
Tunis	30
Beijing	30
New Dehli	30
Bangkok	27
Jakarta	30
Sydney	22
New York	28
Miami	30
Los Angeles	22
Meksikobýur	19
Panama	29
La Paz	12
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	16

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 982 hPa. yvir landsynningspartin av Íslandi fer spakuliga í landnyrðing og grynnist. Eitt hátrýst, 1026 hPa. á 52N-30V fer móti Írlandi.



Í dag:
Hátrýstið við Írland fer spakuliga í landnyrðing og ein hátrýstryggur til Íslands verður yvir Føroyum hóskvøldið.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 10/7 kl. 06^{00}– 11/7. 06^{00}. Hitin í gjár: 11,3°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0 mm – mált frá 10/7 kl. 06^{00}– 11/7 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í juli: 23,6 mm

VESTFALLSKYRRINDI

11. juli Fullmáni

Kelda: Almanakkin 2006

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
12. Juli	08.27	20.52	07.27	19.52	07.42	20.07	10.27	22.52	11.27	23.52	06.42	19.07	05.42	18.07	08.42	21.07	09.42	22.07	08.12	20.37	09.27	21.52
13. Juli	09.18	21.42	08.18	20.42	08.33	20.57	11.18	23.42	-	12.18	07.33	19.57	06.33	18.57	09.33	21.57	10.33	22.57	09.03	21.27	10.18	22.42
14. Juli	10.07	22.30	09.07	21.30	09.22	21.45	-	12.07	00.42	13.07	08.22	20.45	07.22	19.45	10.22	22.45	11.22	23.45	09.52	22.15	11.07	23.30
15. Juli	10.54	23.16	09.54	22.16	10.09	22.31	00.30	12.54	01.30	13.54	09.09	21.31	08.09	20.31	11.09	23.31	-	12.09	10.39	23.01	11.54	-
16. Juli	11.39	-	10.39	23.31	10.54	23.46	01.16	13.39	02.16	14.39	09.54	22.46	08.54	21.46	11.54	-	00.31	12.54	11.24	-	00.16	12.39

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

Sosialurin

GEVID BLÓÐ

5 707265 100043 >